EUROPA CUP
**DYSTARSKRÁ 1 / 2022**

# H71

FRÍGGJADAG/LEYGARDAG
**14.-15. OKTOBER**



## EUROPA CUP:

KVINNUR: Fríggjadagin 14. oktober
**KL.18.00: H71- SC Ferlach**
KVINNUR: Leygardagin 15. oktober
**KL.18.00: SC Ferlach - H71**

sms · SUÐUROYAR SPARIKASSI · ARTICON · WENZEL.FO · BÓNUS · INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur · BYGMA BALSLEV · TRYGD · ADVOKATFELAGIÐ




*Anna Dam, forkvinna í H71*

## Góðu hoyvíkingar!

So stendur aftur ein hondbóltsvetur fyri durum, og vit gleða okkum øll til bæði at fara í Hoyvíkshøllina og ymsar aðrar hallir kring landið at síggja H71 spæla. Eisini eru spennandi tíðir fyri framman í landsliðshondbólti, so ov mikið er at hugsa um hjá okkum, sum eru so heppin, at vit eru góð við hondbólt.
Júst nú leggja kvinnurnar hjá H71 seinastu hond á fyrireikingarnar til teir báðar EHF Europa Cup-dystirnar, tær nú skulu spæla niðri í Eysturríki ímóti SC Ferlach.

Tær fóru av landinum fyrr í vikuni og eru nú komnar væl upp á pláss, so tær kunnu venja seg við umstøðurnar, nú tað stundar til dystir.
Síðsta kappingarár vóru H71-kvinnurnar tann heilt stóra sólskinssøgan í føroyskum hondbólti, tá ið tær eitt umfar fyri og annað eftir spældu seg víðari í europeisku kappingini. Ja, so væl gekst, at tær komu í fjórðingsfinaluna í EHF Europa Cup-kappingini, áðrenn tær máttu lúta fyri ytri umstøðum, tí kríggj hótti Ukraina.

Ta søguna kenna vit, so óneyðugt er at endurtaka hana.
Nú vóna vit so, at væl fer at gangast hesaferð. Í øllum førum hava venjarar og spælarar gjørt sítt allarbesta fyri at vera so væl fyri, sum tað ber til, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað ber. Vit vita so lítið um eysturríksku mótstøðuna, at vit bara kunnu gita. Men vóna kunnu vit altíð!

## Spara seg ikki

Í landskappingini hava kvinnurnar eisini lagt væl frá landi. Talan er stórt sæð um sama hóp sum síðsta kappingarár, men royndirnar eru størri nú, enn tær vóru fyri einum ári síðani, so eisini har eru vit sera spent.
Hjá monnunum eru størri broytingar, tí har hava vit verið so heppin at hava fostrað so mikið góðar spælarar, at teir í hópatali eru eftirspurdir uttan fyri landoddarnar. Tí verður talan í vetur um at byggja eitt nýtt lið upp, og tað sær eisini út til at ganga rætta vegin. Eisini teir bíða spentir eftir sínum europeisku avbjóðingum, sum verða tann 4. og 6. nov. í Serbia.
Styrkin og bulurin í H71 er barna- og ungdómsarbeiði, ið er grundarlagið undir øllum tí, sum annars hendir í felagnum. Vit leggja stóran dent á at geva komandi ættarliðunum gott í beinið, og eru vit eisini sera spent at síggja, hvussu veturin fer at hildnast hjá teimum yngru, ið ikki spara seg, men leggja nógva tíð og orku í hondbóltin.
Tíbetur eru vit so heppin í H71, at vit hava nógvar og góðar stuðlar, ið gera tað møguligt hjá felagnum at gera eitt gott og miðvíst arbeiði, so hondbólturin mennist støðugt. Teimum takka vit hjartaliga fyri stuðul og gott samstarv, tí uttan allar stuðlarnar bar alt hetta ikki til.
Við hesum orðum vil eg fegin ynskja øllum hoyvíkingum og øðrum við ein góðan hondbóltsvetur!





WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
78
BANKNORDIK
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO



ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



# AFTUR Á ÆVINTÝRFERÐ

*H71-kvinnurnar eru komnar væl upp á pláss í Eysturríki, har tær nú fyrireika seg til teir báðar EHF Europa Cup-dystirnar ímóti SC Ferlach um vikuskiftið.*

*Kvinnuliðið hjá okkum, sum síðsta vetur rúnarbant føroyska hondbóltsheiminum og onnur við, skal um vikuskiftið spæla EHF Europa Cup-dystir í Eysturríki.*

Fremsta kvinnulið okkara er í vikuni farið til Eysturríkis fyri at spæla EHF Europa Cup-dystir ímóti SC Ferlach, sum spælir í bestu eysturríksku deildini. Avtala er gjørd millum feløgini um, at báðir dystirnir verða spældir í Eysturríki um vikuskiftið.

Ilt er at meta um vánirnar undan dystunum, men eitt er vist, at sýna ungu kvinnuligu stjørnur okkara sama hugburð og fremja somu avrik, sum tá ið tær vóru við í EHF Europa Cup-kappingini í fjør, so er eingin ivi í, at tær koma at standa seg væl. Satt at siga, rúnarbundu tær allan tann føroyska hondbóltsheimin og onnur við, tá ið tær ferð eftir ferð at sigra í kappingini í fjør, har tær vunnu trý umfør og spældu í fjóringsfinaluni. Ja, í veruleikanum skuldi kríggið í Ukraina til fyri at forða teimum í at spæla seg fram til hálvfinalurnar í kappingini. Eitt leikligt liðavrik, ið ikki hevur sín líka í føroyska ítróttarheiminum.

## Fingið góða byrjan

Vit hava at kalla sama kvinnulið sum í

fjør, tó so, at vinstri vongurin, Rannvá Olsen, er farin aftur til barndómsfelag sítt, VÍF, og enn eiga vit til góðar at síggja Mariu Halsdóttir Weyhe á vølli, tí hon í vikuvís hevur drigist við skaða. Maritu Mortensen fingu vit aftur til endaspurtin í fjør, og harafturat eru ungir og evnaríkir spælarar afturkomnir, eftir at hava verið eitt ár á eftirskúla í Danmark, umframt tær ungu, sum bankaðu uppá at fáa pláss á liðnum síðsta kappingarár. Samanumtikið má kvinnuligi hópurin sigast at vera mentur í mun til í fjør. So tað svitast ikki, at hoyvíkingar eru ikki uttan vónir til europeisku dystirnar hjá kvinnunum um vikuskiftið.
Kvinnurnar hava eisini staðið seg væl higartil í landskappingini í ár og eftir fýra umfør eru tær á odda í kappingini við sjey stigum, tað sama sum Kyndil. Tríggir sigrar hava verið og so ein javnleikur, ið júst var ímóti Kyndli í vikuni undan fráferðini.
Eisini vunnu tær stórsteypabikarið á sannførandi hátt við einum lemjandi sigri á júst Kyndli, áðrenn landskappingin byrjaði, so tað sær bara spennandi út.

## Menninir byggja upp

Hjá monnum er leikliga støðan nakað øðrvísi. At kalla alt liðið, sum á sannførandi hátt vann greipuna, tá ið undanfarna kapping endaði í vár, er selt av landinum, og spæla hesir ungu menn nú í ár við liðum í hinum norðurlondunum og í Fraklandi.
Óli Mittún er í fremstu deildini í Svøríki, Pauli Mittún í fremstu norsku deildini, Janus Dam Djurhuus í fremstu íslendsku deildini, Pauli Jacobsen í næstfremstu fronsku deildini, Pætur Mikkjalsson í næstfremstu svensku deildini, og harafturat er Pætur Thomsen farin av landinum í lestrarørindum og er – sum er – ikki farin undir at spæla hondbólt samstundis.
Sostatt skulu vit í vetur byggja eitt nýtt lið upp rundan um spælarar sum Peter Krogh, Róa Ellefsen á Skipagøtu, Svein Olafsson, Rók Ziskason, Boga Hansen og Baldur Gillason, ið er afturkomin til barndómsfelag sítt, umframt aðrar. Hetta arbeiði sýnist at eydnast væl og er nýggi hópurin avgjørt við at finna stevið.
Eftir fýra umfør hevur H71 vunnið tveir dystir, ein ímóti Neistanum og ein ímóti Kyndli, hevur spælt ein javnt ímóti StÍF og tapt ein tepurt ímóti VÍF. Avgjørt góðkent avrik higartil í ár, og verður tað spennandi at fylgja hópinum víðari í menningararbeiðinum. Hvussu langt vit røkka í lands- og steypakappingini, vil so tíðin vísa.


AnniJanni
FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI










DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO



Vit raka málið!




Tað besta ommaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!



HILMAR JAN HANSEN

# JANA FER TIL VIBORG NÆSTA SUMMAR

*Jana Mittún, sum her sæst í EHF Europa Cup-dysti í vár ímóti ukrainska HC Galychanka Lviv, fer eftir hetta kappingarárið niður at spæla við danska stórfelagnum, Viborg HK*

*Nú er greitt, at Jana Mittún spælir hetta kappingarárið afturat í H71, og síðani fer hon til Viborg HK í bestu donsku hondbóltsdeildini, har hon hevur skrivað sáttmála fyri eitt trý ára skeið.*

Tað hevur bara verið ein spurningur um tíð, til Jana fór at gera tað sama sum beiggjarnir, Pauli og Óli, ið longu eru farnir av landinum at spæla hondbólt. Evnini eru eyðsýnd og viljin trýtur ikki, og fyri nøkrum døgum síðani gjørdist tað alment kent, at tað næsta summar verður hennara túrur at fara víðari á hondbóltsyrkisleiðini.

– Eg fari fyrst og fremst til Danmarkar næsta summar fyri at spæla hondbólt fulla tíð. Um eg so annað ella triðja árið eisini fari at hugsa um onkra útbúgving, kemur tíðina at vísa, tí fyrst og fremst er tað hondbólturin, ið skal roynast, sigur Jana Mittún.
Hon sigur seg skilja á lagnum, at í Viborg er eitt gott umhvørvi utt-

an fyri hondbóltin og at nógvir av spælarunum búgva í sama íbúðarblokki, har hon helst eisini fer at búgva, tá ið tann tíð kemur.
– Eg gangi høgt uppí, at tað sosiala er til staðar, tí tað havi eg brúk fyri. Skal eg siga fyri meg, so hevði eg ikki hildið tað verið so stuttligt bara at vant hondbólt og so annars bara at sitið heima, sigur 18 ára gamla Jana, ið varð kosin ársins spælari síðsta kappingarár, eftir at H71 hevði vunnið føroyameistaraheitið.

## Byggja nýtt lið upp

Sum sagt, hevur hon skrivað undir ein trý ára sáttmála, so næsta summar, tá ið vit eru komin út í hálvan juli ella har á leið, byrjar hennara nýggja yrkisleið.
– Tá eri eg eisini liðug á Glasum, har eg fyrst geri meg lidna við búskaparbreytina í handilsskúlanum. Mær dámar væl at ganga í skúla og tími væl at gera bæði, men fyrst skal eg finna meg til rættis, tá ið eg komi til Viborg, sigur Jana, ið áður hevur verið eitt ár niðri á ítróttareftirskúla, so tað er ikki púra fremmant fyri hana at vera heimanifrá.
Onkur annar enn Viborg HK hevur eisini spurt seg fyri, men fyri Janu kendist jútska felagið sum ein góður møguleiki, tí tey eru í ferð við at byggja upp av nýggjum, eftir at onkrir av teimum heilt frægu spælarunum eru farnir víðari.
– Eg síggi tað avgjørt sum ein fyrimun at gerast partur av nøkrum, sum verður bygt upp, og í øllum førum eri eg sera spent at sleppa at royna meg sum hondbóltsspælari fulla tíð. Tað er dreymurin hjá mær, at sleppa at royna at fara “all-in” sum hondbóltsspælari, sigur hon.

## Fær góð skoðsmál

Viborg HK er eitt av sigursvandu donsku feløgunum, ið tríggjar ferðir hevur vunnið EHF Champions League, tríggjar ferðir EHF Cup, eina ferð Cup Winners Cup, umframt 14 ferðir danska meistaraheitið og 10 ferðir steypakappingina.
Sum Jana nevnir, arbeiðir felagið við at byggja sær upp eitt nýtt, sterkt og gott kvinnulið, og tí er einki at siga til, at tey í Viborg eisini hava kveitt til Hoyvíkar og Føroya, tí her er hondbólturin í stórari menning við nógvum evnaríkum spælarum.
– Sum fleiri onnur feløg hava vit havt eitt vakið eyga við Janu Mittún, og eg eri errin av, at hon kemur higar at spæla í grøna búnanum frá næsta kappingarári, sigur stjórin í Viborg Håndboldklub við heimasíðuna hjá felagnum, har hann gevur Janu sera góð skoðsmál.
– Enn hava vit bara sæð toppin av tí potentiali, hon hevur, og eg vóni og trúgvi uppá, at vit kunnu geva henni møguleikar til at folda seg út. Eg síggi hana sum ein viljasterkan spælara við

stórum ambitiónum, sum er til reiðar at taka næstu fetini, so vit gleða okkum nógv til at fáa hana til Viborg. Sjálv hevur Jana fyrr í ár verið og vitja í danska felagnum, og fekk hon tá eina góða kenslu av, hvussu tað var, og hon sigur seg eisini vera erna av, at hon sleppur at spæla við einum felag við so langari og stoltari søgu.

**Vit í H71 eru fegin um, at enn ein av okkara spælarum fær møguleikan uttan fyri landoddarnar, men eru samstundis takksom fyri, at Jana áðrenn tað tekur ein vetur afturat hjá okkum!**



*Tað kom ikki óvart á, at Jana gekk í fótasporunum hjá beiggjum sínum, Óla og Paula, sum báðir eru farnir av landinum at spæla hondbólt. Eisini pápin, Petur, spældi í síni tíð í donskum hondbólti*



1 Rúna Jógvansdóttir Larsen
2 Elsa Egholm
4 Brynhild Pálsdóttir
5 Vár Bentsdóttir Zachariasen
6 Bjørk Brimnes
7 Maria Halsdóttir Weyhe
8 Karin Egholm
9 Marita Mortensen
11 Lukka Arge
12 Alda av Skarði
13 Inga Maria Joensen
14 Sunniva Bogadóttir
15 Christina Turiðardóttir Arge
17 Lív Bentsdóttir Zachariasen
25 Sára Jacobsen
27 Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe
29 Poula Fríðheim Petersen
77 Jana Mittún
99 Guðrið Bogadóttir á Borg

**Venjari:** Benjamin R. Christiansen
**Hjálparvenjari:** Jon Arne Kamsvåg
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Alexander Lein Martinsen
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Kyndil | 4 | 120 | 91 | 29 | 7 |
| **2.** | **H71** | **4** | **129** | **90** | **39** | **7** |
| 3. | Stjørnan | 4 | 118 | 105 | 13 | 6 |
| 4. | Neistin | 4 | 99 | 96 | 3 | 4 |
| 5. | Víf | 4 | 104 | 106 | -2 | 4 |
| 6. | VB | 4 | 88 | 98 | -10 | 3 |
| 7. | Stíf | 4 | 81 | 113 | -32 | 1 |
| 8. | EB | 4 | 81 | 121 | -40 | 0 |



1 Torstein Sivertsen
2 Sveinur Olafsson
5 Rói Seyer Hjaltason
7 Baldur Gillason
8 Tórmóður Petursson Djurhuus
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
10 John Skaalum Vilhelm
15 Ragnar Karlsson
18 Sakir Tróndarson Frýdal
21 Høgni Højsted
23 Ári Rúnason
28 Rói Ellefsen á Skipagøtu
30 Poul Símun í Garði
31 Rói Heinason Thomsen
39 Rókur Ziskason
45 Peter Krogh
50 Alexander Lein Martinsen
71 Bogi Hansen

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen

BURN FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Víf | 5 | 146 | 131 | 15 | 10 |
| 2. | Kíf | 4 | 113 | 103 | 10 | 6 |
| **3.** | **H71** | **4** | **109** | **102** | **7** | **5** |
| 4. | Neistin | 3 | 76 | 86 | -10 | 2 |
| 5. | Kyndil | 5 | 112 | 123 | -11 | 2 |
| 6. | Team K. | 4 | 109 | 115 | -6 | 2 |
| 7. | Stíf | 3 | 82 | 87 | -5 | 1 |

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



HILMAR JAN HANSEN

# SC FERLACH LÁNT ODDASESSIN

*Kvinnuliðið hjá SC Ferlach, sum tað stóð avmyndað í einum eysturríkskum dagblaði nú um dagarnar.*

*Eysturríkskur kvinnuhondbóltur hevur síðstu 50 árini stórt sæð bara snúð seg um eittans felag,  Hypo Niederösterreich, ið sannførandi hevur vunnið alt, ið vinnast kann. SC Ferlach er í løtuni á odda í eysturríksku hondbóltsliguni, men helst er oddasessurin bara til láns.*

Besta kvinnudeildin í eysturríkskum hondbólti er neyvan tann mest spennandi at vera partur av, tí síðani 1972 eru tað bara trý feløg, ið hava vunnið meistaraheitið – og harav hevur fullkomiliga einaráðandi stórfelagið, Hypo Niederösterreich, vunnið heilar 44 ferðir!

Union Admira Landhaus vann fimm tey fyrstu árini, frá 1972 til 1976, og síðani yvirtók Hypo Niederösterreich fullkomiliga pallin og vann øll árini á rað frá 1977 til 2018, áðrenn WAT Atzgersdorf í 2019 breyt metlongu sigursrøðina hjá einaráðandi stórfelagnum.

Í 2020 vann eingin meistaraheitið í kvinnuhondbólti í Eysturríki – júst sum hjá okkum – orsakað av koronu, men síðstu tvey árini hevur Hypo Nied-

erösterreich aftur sett seg á trúnuna. Eysturríkska landskappingin er farin í gongd, og har er okkara mótstøðulið, SC Ferlach, í løtuni á odda við fullum stigatali fyri fimm dystir. Men helst er oddasessurin bara til láns, tí við til søguna hoyrir, at Hypo Niederösterreich bara hevur spælt fýra dystir…

## Fyrstu ferð

Tá ið dystirnir fríggjakvøldið og leygarkvøldið klokkan 18 verða brísklaðir í gongd í Ballspielhalle Ferlach, er tað fyrstu ferð, at kvinnulið teirra spælir europeiskan hondbólt, so har hava okkara eitt lítið sindur størri royndir, tí tað jú síðsta kappingarár eydnaðist at spæla heilar sjey dystir. Onkur einstakur av spælarunum hjá SC Ferlach hevur tó roynt europeiskan hondbólt í øðrum feløgum, skilst á lagnum, men fyri tær flestu er hetta spildurnýtt.

– H71 er eitt ungt, men stórt felag, ið spælir skjótan og kropsligan hondbólt í norðurlendskum stíli, so tað mugu vit laga okkum eftir, sigur liðskiparin hjá SC Ferlach, Anna Kavalar, ið saman við hinum hevur roynt at fyrireika seg síðstu tíðina.

– Hvør einstakur spælari kennir sína uppgávu, men kortini er brúk fyri, at allar standa saman og berjast í verjuni, sigur venjarin, Iva Kanjugovic, ið heldur liðið hjá sær hava neyðuga sjálvsálitið.

## Minnir um H71

Søgan um SC Ferlach er annars ikki ólík okkara, tí upprunin gongur aftur til ein apríldag í 1963, tá ið nøkur ungfólk í Ferlach hittust fyri at seta felagið á stovn. Tá vóru tey sjálvandi púrasta óvitandi um, at felagið enn tann dag í dag, nú skjótt trýss ár eru liðin, livir sítt fríska lív.

Felagið byrjaði við badminton, men longu í 1964 kom hondbólturin við, og hann er í dag berandi ítróttargreinin í SC Ferlach. Síðani eru ítróttargreinar komnar og farnar, og vit kunnu nevna karate, flogbólt, borðtennis og kurvabólt, umframt at felagið eisini er virkið innan fólkaheilsuítrótt.

Eins og hondbólturin í Føroyum byrjaði á grúsi, vóru umstøðurnar hjá SC Ferlach aðrar enn tær í dag, tí har byrjaði felagið at spæla á grasvølli. Kvinnuliðið flutti upp í bestu kvinnudeildina í 2019, og felagið, sum í síni tíð byrjaði við amatørhondbólti, er í dag eitt felag við yrkisspælarum.

## Gera fortreð

Tá ið sagt verður omanfyri, at SC Ferlach minnir um H71, so skal tað tó takast við einum stórum fyrivarni. Sum vit hava skilt, hevur blíðskapurin mótvegis H71-kvinnunum verið fínur, men tá ið tað kemur til stroymingina av teimum báðum dystunum, hevur verið øðrvísi.

Frá byrjan hava tey í eysturríkska felagnum gjørt alt fyri at forða fyri, at dystirnir skuldu stroymast, hóast tey sjálv eru von at stroyma heimadystir. Eisini er tað eitt sindur løgið, tá ið havt verður í huga, at H71 altso hevur eftirlíkað eysturríkska ynskinum um, at báðir skuldu spælast har.
Talan hevur verið um beinleiðis mótarbeiði, tí felagið vildi ikki koma í ta støðu, at tað møguliga skuldi enda við bót ella revsing, tí tveir europeiskir dystir vórðu stroymdir. Sjálvandi er púrt einki í hesum, tí tvørturímóti koyrir europeiska hondbóltssamgongan á øll feløg um at gera alt, tey eru ment, fyri at fáa hondbóltin fram.
H71 gavst tó ikki so, og felagið fer nú við góðari hjálp frá Búgva Øster at royna at fáa báðar dystirnar stroymdar, enntá við føroyskum viðmerkjarum. Vónandi fæst alt tað tekniska at rigga, so hetta skal bera til, og fólk kunnu fylgja við á Facebook-vanganum hjá H71 ella heimasíðu okkara fyri at fáa at vita, hvar dystirnir kunnu stroymast.
Dystirnir verða stroymdir á hsf.live.fo




*Sum sæst á heimasíðuni hjá SC Ferlach, er vanliga eingin trupulleiki at síggja dystirnar, tí har verður dúgliga stroymt. Men nú H71 kemur á vitjan, bar brádliga einki til!*

fk




Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

Alt til *HITA SANITET & VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

FAROE SHIP



Mynd: Gudmund Helmsdal


www.laiderz.dk

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

Et her, tak við ella bílegg

# mál

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




*10 Miðal salatir*

**350,-**

Spar 50 kr

Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo

ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo





Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo





TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip